# lívdin

- í lívd hins hægsta

Oktober 2008



# Stuðulstiltak í Oasuni




Leygardagin 11. oktober 2008 kl. 20 verður eitt stuðulstiltak í Oasuni í Hoyvík til frama fyri barnaheimið Jaja's Home í Uganda. Tað er felagsskapurin Samaritans Purse (Christmas Child), ið stendur aftanfyri barnaheimið.

Á skránni verður nógvur ymiskur tónleikur, har Heini Lützen og onnur eru við, lovsongsdansur o.a. Til ber at stuðla hesum barnaheimi við at geva eina gávu á konto nr. 9181 169.384.2 í Eik Banka.

Tey, sum ynskja at vita meira um tiltakið, eru vælkomin at kontakta Ildu Lómstein á tel. 545144 ella Alice Mortensen á tel. 276962. Øll eru hjartaliga vælkomin.





*Ilda*



*Alice*

### Koma saman til tess at fara út

Samkoman kemur saman til tess at fara út. Ein bilur koyrir inn á eina bensinstøð at fylla tangan, so hann fær koyrt og komið allastaðni, har bilførarin ætlar at fara. Hvar brúkar ein bilur meiri tíð, á bensinstøðini ella á vegnum? Bilurin brúkar sjálvandi nógv meiri tíð at gera tað, sum bilar gera – nevniliga at koyra á vegnum. Men hann fer á bensinstøðina at fylla tangan, so hann kann koyra á vegnum.

Tað sama er við tí andaliga lívinum. Endamálið við at koma saman er at „fylla tangan“, so vit kunnu fara út at gera tað, sum vit eru kallað til – at dýrmeta Kristus og vinna menniskju fyri Hann. Hvar brúka vit meiri tíð, á møti ella úti millum fólk? Mátti Harrin hjálpt okkum ikki bert at koma á møti men eisini at vera samkoma Kristusar allastaðni, har vit koma.

*Jógvan Zachariassen*

## Vinir í Lívdini

### Tillukku við hjúnabandinum



Leygardagin tann 30. august giftust Jóannes Vitalis Hansen og Tonicia Cherese Brade í Ebenezer. Veitslan var á Hotel Føroyum. Tonicia er uppvaksin í London í Onglandi. Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku og vælkomin í Lívdina.

### Elsa Øregaard á bíbliuskúla



Á møtinum sunnudagin 21. september varð biðið fyri Elsu Øregaard, sum er farin til Onglands at ganga á bíbliuskúlanum Capernwray Bible School. Hon tekur í fyrsta umfari eitt semestur til mars 2009, og møguliga eitt aftrat komandi summar.

### Tillukku við barninum



1. september fingu Birgit og Heðin Krett, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3625 gr.

### Nýggj føroysk sjónvarpsrás




IKTUS – kristiligt sjónvarp er ein nýggj føroysk sjónvarpsrás, sum fer at senda á nýggjum talgildum sendineti. Talan er um eitt tvørkirkjuligt forum, har allar evangeliskar kirkjur og samkomur kunnu luttaka í sendingum.

IKTUS - kristiligt sjónvarp varð stovnað í mai 2008. Ætlanin er at byrja nakrar regluligar sendingar í oktober, og síðan víðka um senditíðina í takt við at kirkjur, samkomur og onnur áhugað byrja at lata meira tilfar og luttaka í beinleiðis sendingum. IKTUS er ein sokallað free-to-air rás, t.v.s. at hon krevur einki kort, er ókeypis at síggja og verður fíggjað við stuðlum og gávum. Heimasíðan hjá IKTUS er: www.iktus.fo

### Christmas Child



Minnist til at pakkarnir til Christmas Child í ár skulu verða inni í seinasta lagi sunnudagin 26. oktober 2008.

Tey, sum ynskja at luttaka í Christmas Childtiltakinum, eru vælkomin at venda sær til Duritu Djurholm á tlf. 316099.

## Anna Maria við til Rumenia

23. september 2008 fór eitt ferðalag við Norrønu fyri at koyra til Rumenia við klæðum, peningi og øðrum til at geva treingjandi í Rumenia.

Á túrinum varð eisini skipað fyri møtum og øðrum tiltøkum.

Ein av teimum sum fór við til Rumeina er Anna Maria Anthoniussen, sum á møti í Lívdini greiddi frá um tørvin í Rumenia. Hon upplýsti, at um tey kundu hjálpt 40 familjum við vitaminum í eitt ár, so hevði tað verið ein stór hjálp.

Lívdin stuðlar hesum arbeiði í Rumenia.



# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

7. okt.: Húsbólkur
14. okt.: Bønarløta
21. okt.: Bønarløta
28. okt.: Húsbólkur



## Mammubólkur á Brekku

Annanhvønn fríggjadag kl.10.30 fyrrapart er mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Mammubólkurin er fríggjadag í líka viku, t.v.s. viku 42, 44, 46 o.s.fr. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomar at ringja til Súsonnu Joensen á tel. 319899.

## Bønarløtur á Brekku



Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 08.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen sum skipa fyri.

## Heimasíðan hjá ungdóminum

Ungdómurin í Lívdini hevur í eina tíð havt sína egnu heimasíðu, sum er: www.ung.livdin.fo.

**UNG Í LÍVDINI**

## Innsavning til Bíbliur




Á informatiónsborðinum í Lívdini stendur ein krukka, har fólk hava høvi at lata pening til fígging til prenting av Bíblium í Kina. Kostnaður fyri prent og útbreiðslu av einari Bíbliu í Kina er 20 kr.

Eisini ber til at stuðla tiltakinum við at flyta pening á konto í Eik banka: 9181 128.239.7, viðmerkt: Bíbliur til Kina.

Í Kina er í dag tann størsta vekingin í samkomusøguni. Hetta ger, at tørvurin á Bíblium er ovurhonds stórur. Málið er 100.000 Bíbliur til Kina frá Føroyum í 2008. Ábyrgd av tiltakinum hava Jógvan Zachariassen og Jeffri Johannesen.

## Victor heiðraður við standmynd



Ein standmynd av bíbliutýðaranum, trúboðaranum og mentamanninum Victor Danielsen, sum búði í Fuglafirði, varð avdúkað á fríøkinum vestan fyri Siloa í Fuglafirði sunnudagin tann 28. september. Tað er listamaðurin Hans Pauli Olsen, sum hevur gjørt standmyndina.

Hendan dagin var eisini ein framsýning um Victor Danielsen í Ribarhúsi. Talan er um somu framsýning, sum sýnd varð fram á 100 ára føðingardegi hansara í 1994.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



Jógvan



Beinta



Poul



Poul



Jákup

### Sunnudagin 5. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni (Keldan vitjar)*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Ápostlasøgan 5-6: Mikla kraft og nærvera Harrans*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 12. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*
*Talari: Beinta Áargarð*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Ápostlasøgan 7-9: Kostnaðurin av at fylgja Jesusi*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 19. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Ápostlasøgan 10-12: Evangeliið er eisini fyri heidningarnar*
*Talari: Poul Guttesen*

### Sunnudagin 26. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Christmas Child og tankar úr Ápostlasøguni*
*Talari: Poul Guttesen*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Ápostlasøgan 13-20: Hvat vit læra um missión frá trúboðaraferðum Paulusar*
*Talarar: Poul Færø og Jákup N.Olsen*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*